# Íslendingarnir rokna við at fáa frí

**Tað verður kanska ikki so stórur trupulleiki at fáa flestu útisetarnar við til Sveis at spæla ímóti Hollandi, sum tað eina ferð tóktist at fara at verða**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Ivin ella óttin fyri at mannfallið millum útisetarnar skal gerast stórt, tá ið landsliðið 1. juni skal spæla ímóti Hollandi í Sveis, tykist nú ikki at nýtast at verða so stórur, sum hann higartil hevur tókst at verið.

Nógv bendir á, at teir tríggir landsliðsspælararnir, sum eru í íslendskum fótbólti, kortini fara at fáa frí til at fara við landsliðnum til Sveis.

Fyrsta umfarið í íslendsku landskappingini er á skránni 15. mai. 1. juni ella triðja hvítusunnudag skulu sambært løgdu skránni bæði feløgini, sum hava føroyskar landsliðsspælarar í hópinum, spæla landskappingardystir. Akranes, sum hevur Julian Johnsson á miðvøllinum, skal henda dagin spæla á heimavølli ímóti KA av Akureyri, og Fram, sum hevur Fróða Benjaminsen og Hans Fróða Hansen á liðnum, skal sambært løgdu skránni spæla í Grindavík týsdagin 1. juni.

### Útilokar ikki luttøku

Julian Johnsson og liðfelagarnir í ÍA komu mánadagin aftur til Íslands. Teir høvdu í átta dagar verið á venjingarlegu í Týsklandi. Eitt nú spældu teir venjingardyst ímóti Bochum. Úrslitið var 1–1.

Tá ið vit spyrja Julian, um hann roknar við at fara við landsliðnum til Sveis um ein mánað, so vísir hann fyrst til skrivið, sum felagið og hann sjálvur fyri fleiri vikum síðani fingu frá FSF.

– Einki er heilt víst her í verðini og als ikki, tá ið tað hevur við fótbólt at gera. Men felagið hjá mær hevur ongantíð fjalt yvir, at teimum dámar væl, at teir hava ein føroyskan landsliðsspælara á liðnum. Tá ið skrivið kom frá FSF, sum boðaði frá landsdystinum 1. juni og at eg møguliga fór at verða úttikin, nevndu teir møguleikan, at dysturin ímóti KA kanska kundi flytast orsaka av hesum. Sum eg havi skilt á Hans Fróða og Fróða, so er tað eisini møguleiki fyri, at dysturin hjá Fram verður fluttur, tí vit verða burturstaddir við landsliðnum. Um tað verður soleiðis, so verður eingin trupulleiki. Hugburðurin hjá ÍA er so mikið positivur fyri landsliðsfótbólti, at tað væl kundi hent, at eg slapp avstað, sjálvt um dysturin ímóti KA ikki hevði verið fluttur, sigur Julian Johnsson, sum altso heldur tað vera sera sannlíkt, at hann um ein mánað fer saman við liðfeløgunum á landsliðnum suður til Sveis at dystast við hollendsku heimsstjørnurnar.

### Ikki stórvegis trupulleikar

Umframt teir tríggjar í Íslandi er talan um fimm aðrar útisetar, sum mugu roknast at hoyra til landsliðsferðalagið. Teir eru Johan B. Hansen í Horsens, Jákup á Borg í OB og so teir tríggir í Fremad Amager – Hjalgrím Elttør, Andrew av Fløtum og Jann Ingi Petersen.



*Julian Johnsson heldur góðar møguleikar vera fyri, at hann og hinir útisetarnir í Íslandi vera við, tá ið Føroyar fara at spæla vinardyst ímóti Hollandi*

2. hvítusunnudag, 31. mai, sum er dagin undan landsdystinum í Sveis, skal Horsens spæla landskappingardyst á heimavølli ímóti Silkeborg. Í løtuni eru tað júst hesi bæði feløgini, sum eru á tveimum teimum ovastu plássunum í 1. deild. Fremad Amager skal hvítusunnudag spæla á heimavølli ímóti Randers FC. Meðan Fremad Amager stríðist fyri at sleppa undan niðurflyting, stríðist Randers FC um at fáa annað uppflytingarplássið frá Horsens.

Johan B. Hansen er fastur maður á Horsens liðnum. Tí er tað ivasamt, um tað fer at bera til hjá honum at fara burturfrá, tá ið so týdningarmikil landskappingardystur verður á skránni. Hjá hinum spælarunum í donsku kappingini verður talan ikki um trupulleikar. Jákup á Borg og OB og superligan gera burturav sær mitt í mai, tí danska landsliðið skal til Portugal at luttaka í EM endaspælinum. Og tað verður um reppið, at teir í Fremad Amager vera lidnir at spæla, tá ið føroyska ferðalagið hvítusunnudag millumlendir í Kastrup – um teir tríggir fara at sleppa upp í part ímóti Randers.

Orsakað av landsdystinum í Sveis er føroyska landskappingin løgd soleiðis, at eitt umfar í 1. deild er á skránni hvítusunnuaftan, meðan 2. deild spælir 2. hvítusunnudag. Hetta hevur við sær, at tað fer at bera til hjá landsliðnum at fara av landinum hvítusunnudag.

### Einki hóvasták

Tá ið vit tosaðu við Henrik Larsen, landsliðsvenjara, um henda spurningin, hevði hann ikki sett seg í samband við útisetafeløgini fyri at frætta, um tey vóru sinnað at lurta eftir ynskinum, sum FSF hevði sett fram í brævinum, sum teir sendu fyri fleiri vikum síðani, og tað segði hann seg heldur ikki ætla at gera.

Tá ið vit í fyrradagin spurdu okkum fyri á FSF umsitingini, hvat teir vistu um vánirnar fyri at fáa útisetarnar við til Sveis, upplýsti Ísak Mikladal, FSF aðalskrivari, at landsliðsvenjarin hevði fingið boð um at fylgja skrivinum til útlendsku feløgini upp. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað varð roknað við, at Henrik Larsen, soleiðis sum landsliðsvenjarar ofta plaga at gera, skuldi seta seg í samband við feløgini fyri at tosa við tey um at geva føroysku spælarunum loyvi at sleppa burturfrá.

Venjarin ásannaði, at talan kundi gerast um ein trupulleika, men hann helt seg ikki kunna gera nakað annað, tí 1. juni er ikki dagur, sum av UEFA og FIFA er avsettur til landsdystir.

Eftir at vit hava verið í sambandi við Julian Johnsson, kunnu vit staðfesta, at tað tykjast vera vánir fyri, at trupulleikin ikki verður so stórur. Um Henrik Larsen megnar at sannføra venjaran hjá AC Horsens, Kent Nielsen, sum hann hevur spælt saman við á danska landsliðnum um, at tað hevði verið eitt gott hugskot at latið Johan B. Hansen fara við føroyska landsliðnum suður í Alpurnar at renna aftaná Nistelrooy, so eru vánir fyri, at føroyska manningin verður so fræg, sum tað ber til, tá ið Christian Høgni Jacobsen og Jón Rói Jacobsen ikki eru tøkir.

At spælararnir í Fremad Amager ikki fáa so nógva dystarvenjing, sum teir áður hava fingið, heldur Henrik Larsen ikki vera so stóran trupulleika.

– Eg havi áður sagt, at bestu liðini í føroysku kappingini ivaleyst høvdu megnað at hildið seg miðskeiðis í næstbestu donsku deildini. Um Hjalgrím ikki fer at spæla meiri á besta liðnum, enn hann hevur gjørt síðstu tíðina, so verður hann ikki so væl fyri. Men eg haldi ikki, at hetta er so stórur trupulleiki, at hann ikki skal við til Sveis. Hann og hinir í Fremad Amager venja ofta á grasi, og eg rokni við, at Jákup á Borg er betri fyri, enn hann nakrantíð hevur verið, nú hann einar sjey ferðir um vikuna venur saman við teimum bestu í OB og kanska fer at fáa møguleikan á besta liðnum, áðrenn kappingarárið verður liðugt, sigur Henrik Larsen.

# 270 krónur fyri at síggja fronsku stjørnurnar

**Tað ber til at spara fitt av pengum og at tryggja sær bestu áskoðaraplássini, um pakkaloysnin verður bíløgd innan hálvan mai**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Tá ið Frakland 8. september fer at spæla HM undankappingardyst í Føroyum, er tað rættuliga sannlíkt, at nakrir av bestu spælarunum í Europa fara at vera mótstøðumenn hjá føroysku landsliðsspælarunum.

Einki er at ivast í, at áhugin fyri at vera eygnavitni til leikin, tá ið Henry, Pires, Vieira og hinir fara at spæla ímóti Póli, Jákupi, Fróða og hinum, ella tá ið Dávid fer at stríðast ímóti risanum Goliati, verður rættuliga stórur.

Nú er tað víst, at tað henda dagin fer at kosta meiri, enn tað nakrantíð áður hevur gjørt at fara til fótbólt í Føroyum, um ætlanin er at keypa atgongumerki við inngongdina.

Á heimasíðu síni, football.fo, boðar FSF frá, at prísurin við inngongdina fer at vera 270 krónur fyri vaksin og 100 krónur fyri børn upp til og við 16 ára gomlum.

Í HM undankappingini skulu Føroyar spæla fimm heimadystir. Prísirnir tykjast vera ásettir eftir, hvussu stórur áhugin verður roknaður at vera. Ímóti Írlandi verður prísurin við inngongdina 250 krónur, og ímóti Sveis, Kypros og Ísrael er hann ásettur at vera 200 krónur.

### Pakkaloysn

Men tað er ikki neyðugt at punga út við so stórum upphæddum. Á heimasíðuni hjá FSF ber nú til at keypa atgongumerkir til allar dystirnar í senn og fyri ein lægri prís enn tann, sum er nevndur omanfyri. Tilboðið stendur við til 15. mai, og tað eru túsund av bestu plássunum á langsíðunum, sum eru til sølu á henda hátt.

Fyri atgongumerkir til allar fimm heimadystirnar í HM undankappingini er prísurin 750 krónur fyri vaksin og 250 krónur fyri børn upp til og við 16 ára gomul.

Um ikki so langa tíð verður farið undir at selja atgongumerki til einstøku dystirnar í forsølu. Tá verður prísurin fyri dystin ímóti Fraklandi 220 krónur, meðan tað, sum tað er nevnt omanfyri, fer at kosta 270 krónur at keypa atgongumerki við inngongdina – um øll plássini ikki frammanundan fara at verða seld.

Sambært FSF heimasíðuni verður dysturin 8. september í ár ímóti Fraklandi spældur á Tórsvølli. Á heimasíðuni sæst ikki, hvar hinir fýra dystirnir verða spældir. Teir eru hesir: Sveis 4. juni 2005, Írland 8. juni 2005, Kypros 17. august 2005 og Ísrael 7. september 2005.



*Um tað ber til nú beinanvegin at leggja 750 krónur á borðið, so ber til at rinda minni fyri hvønn EM undankappingardystin á heimavølli, enn tað skal gerast, um rindað verður við dyrnar*



# Smátjóð skal gera Føroyar klárar til dystir við risar

**Malta kemur í august mánaði til Føroya at spæla fótbóltslandsdyst ímóti Føroyum. Hetta verður seinasti partur av føroysku fyrireikingini til EM-undanspælið, har Føroyar millum annað skulu hitta Frakland**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Tann 18. august verður landsdystur millum Føroyar og Malta spældur í Føroyum. Hetta hava fótbóltssambondini í Føroyum og á Malta avtalað.

Føroyingar skulu næstu mánaðirnar fyrireikað seg til EM-undankappingina í fótbólti, sum byrjar í heyst, og tað skal millum annað gerast við einum dysti ímóti Hollandi, sum verður spældur fyrsta dagin í juni.

Seinasti parturin av fyrireikingini verður venjingardystur ímóti Malta tann 18. august.

### Ynsktu javnan dyst

Áhugin fyri at spæla venjingardystir ímóti Føroyum er vaksandi, men tað er nógv, sum skal fáast at passa saman, áðrenn ein dystur kann spælast.

Hesaferð eydnaðist tað við Malta, og tað var ikki bara tilvildarligt, at tað gjørdist júst Malta. Landsliðsvenjararnir ynsktu sær ein dyst ímóti einum landi við hesi styrki, so at bæði Føroyar og mótstøðuliðið kunnu vinna dystin.

Hetta verður mett sum góð avbjóðing áðrenn EM-undankappingina, har Føroyar skulu spæla ímóti sterkum fótbóltstjóðum sum Fraklandi og Írlandi.



*Føroyar spæla í august mánaði fótbóltslandsdyst ímóti Malta. Stutt aftan á byrjar EM-undankappingini*

## Burtur við javnleikum

Forsetin fyri altjóða fótbóltssambandið FIFA vil gera enda á dystum, sum enda við javnleiki. Sepp Blatter sigur við týsku tíðindastovuna SID, at eftir hansara hugsan skulu allir fótbóltsdystir í framtíðini avgerast.

– Allir dystir eiga at hava ein vinnara. Tí eiga vit at finna eina skipan, sum allir fótbóltsdystir skulu avgerast eftir. Tað besta hevði kanska verið at havt brotssparkskapping eftir vanliga leiktíð, men eg er tilreiðar at lurta eftir øllum hugskotum, sigur Sepp Blatter.

**ek**

## FCK nógvar skaðar

FC Keypmannahavn er rakt av nógvum skaðum, nú endaspurturin í superliguni verður settur inn. Thomas Røll, sum hevur trupulleikar við hælsinuni, kann eftir øllum at døma ikki spæla aftur í hesum kappingarárinum. Christian Lønstrup er aftur skaddur, Michael Silberbauer hevur eisini fingið ein snudd, og álopsspælararnir Martin Bergvold, Peter Møller og Sibusisu Zuma stríðast eisini við ymsar skaðar. Líkt er tí til, at FCK av álvara fær brúk fyri sínum breiða hópi, og Todi Jónsson kann rokna við at sleppa at spæla í seinastu umførunum.

**ek**

## Giftast í brotsteignum

Álopsspælarin hjá Viborg, Søren Frederiksen, skal 5. juni giftast. Tað er kanska ikki so óvanligt fyri ein fótbóltsspælara, men hann ætlar sær at giftast í brotsteiginum á Viborg Stadion. Hetta hevur hann fingið loyvi til frá borgarstjóranum í Viborg, og eini 80 fólk eru boðin til vígsluna.

Eisini í Týsklandi hevur ein fótbóltsspælari líknandi ætlanir. Toppskjúttin í bundesliguni, brasilski Ailton, hevur sagt, at hann ætlar sær at giftast á leikvøllinum hjá Werder Bremen, um felagið vinnur týska meistaraheitið. Og har sleppa øll viðhaldsfólkini hjá felagnum til vígsluna, hava tey hug til tað.

**ek**

# Føroyingar skutu í Hetlandi

**Um vikuskiftið vóru 16 bogaskjúttar á ferð í Hetlandi, har teir luttóku í einari av fyrstu kappingunum, síðan Føroyar og Hetland skrivaðu undir mentunnaravtalu í fjør**

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*

North Atlantic Archery Tournament varð skotin á Clickimin Sport Center í Lerwick leygardagin 24. apríl við luttøku úr Føroyum, Hetlandi og Orknoyggjunum - íalt 28 bogaskjúttar.

Í bólkinum compound fyri menn vóru 15 luttakarar, í recurve fyri menn 9 luttakarar, í compound fyri kvinnur vóru 2 luttakarar og í recurve fyri kvinnur vóru 2 luttakarar. Tíverri varð luttøkan av kvinnum ikki serliga stór.

Skotið bleiv eitt Olympiskt umfar, sum umfatar tvey umfør á 70 metrum sum innleiðandi, áðrenn raðfestingin til fjórðingsfinalurnar varð staðfest. 8 teir bestu skjúttarnir komu víðari. Í finaluumførunum blivu skotnir 12 pílar.



*Nógvir skjúttar vóru við í kappingini hjá monnum, men hjá kvinnum var luttøkan lítil*



*Per Holm Andersen vann kappingina í compound, eftir sera spennandi finalu ímóti Schandorff Vang*



*Føroyska compound liðið - Sigrid Vang, Schandorff Vang og Per Holm Andersen*

### Kvinnur

Í bólkinum recurve kvinnur vóru Annika Vang og Rakul Dam, báðar úr Føroyum. Annika vann bæði innleiðandi og í finaluskjótingina.

Í bólkinum compound kvinnur vóru Sigrid Vang úr Føroyum og Sara Leith úr Hetlandi. Sara vann bæði innleiðandi og í finaluskjótingina.

### Menn recurve

Í bólkinum recurve menn í innleiðandi umfarinum vóru føroysku luttakararnir Hans Jørn Nielsen nr. 5, Eirikur í Jákupsstovu nr. 7 og Bjarti F. Clementsen nr. 9.

Eirikur skuldi skjóta fjórðingsfinalu móti nr. 2, sum var ein Hetlendingur. Úrslitið var 90-82 til hetlendingin, sum seinni vann bronsufinaluna.

Hans Jørn skuldi skjóta móti nr. 4, sum var ein orknoyingur. Úrslitið var 90-79 til Hans Jørn, sum sostatt fór víðari til hálvfinaluna. Her skuldi hann møta hetlendinginum, sum vann innleiðandi kappingina. Hetta gjørdist ein sera javnur dystur, sum Hans Jørn vann 89-87. Í sjálvari finaluni møtti Hans Jørn enn einum hetlendingi, úrslitið var 101-94 til hetlendingin.

Endaliga finaluúrslitið var, at Hans Jørn bleiv nr. 2 og Eirikur bleiv nr. 5.

### Menn compound

Í bólkinum compound fyri menn vóru 10 føroyingar við í innleiðandi umfarinum, og av teimum kom helmingurin víðari.

Per Holm Andersen skeyt væl hendan dagin og lá á fyrsta plássi við sama stigatali, sum ein hetlendingur, men Per hevði færri 10-arar og bleiv hann tí nr. 2. Schandorff Vang bleiv nr. 4, Anders Jønsson og Albert Dam vóru javnir í stigum, men hevði Anders fleiri 10-arar og bleiv nr. 5, Albert nr. 6 og Jógvan Niclasen nr. 7.

Henda støðan til fjórðingsfinalurnar viðførdi, at Per skuldi møta Jógvani í dysti, sum Per vann 106-99. Schandorff skuldi møta Anders í dysti, sum Schandorff vann 109-95. Albert skuldi møta hetlendinginum, sum bleiv nr. 3 innleiðandi og vann Albert 112-104.

Í semifinalunum møttust Schandorff og ein hetlendingur, hesin dysturin endaði 106-102 til Schandorff. Per skuldi skjóta móti Albert og endaði dysturin við sigri til Per 110-106.

Í bronsufinaluni møtti Albert hetlendinginum, sum Schandorff júst hevði vunnið á og vann Albert trygt. Tíverri hava vit ikki fingið hetta dystarúrslitið við.

Í sjálvari finaluni møttust Per og Schandorff í einum sera jøvnum og spennandi dysti, har tað ongantíð vóru meiri enn 2 stig á muni. Tá síðsti pílurin var skotin, var ivi um, um tað stóð á jøvnum, men tá dómarin fór fram til skivurnar saman við skjúttunum, vísti tað seg, at ein av pílunum hjá Per júst nerti strikuna til hægri stigatal. Við hesum vann Per kappingina við einum stigi - 108-107.

### Liðkapping

Í dystarskjóting fyri lið verða skotnir 27 pílar - 3 umfør á 3 pílar fyri hvønn skjútta í 3 minuttir. Hetta setir stór krøv til skjúttarnar, tí tað skal ganga skjótt. Talan er um helvtar tíð í mun til vanliga skjóting.

Í recurve vóru øll umboðaði og mannaðu Hans Jørn, Eirikur og Annika føroyska liðið, sum bleiv nr. 2 við 164 stigum. Hetland fekk 194 stig og Orknoyggjarnar 148 stig.

Í compound vóru tað bert Hetland og Føroyar, sum kundu manna lið. Á føroyska liðnum vóru Per, Schandorff og Sigrid. Føroyar vann henda javna dyst, sum endaði við 197-194.

Føroyska ferðalagið, sum taldi 19 fólk, kom aftur mánamorgunin við Norrønu.